# Obama á takkarferð



Amerikanski forsetin, Barack Obama, kom í gjár til Afghanistan, og sjálvur segði hann, at ørindini vóru at takka teimum amerikonsku hermonnunum fyri tað, sum teir gera har. Obama hevur eisini onnur ørindi. Beint eftir at hann var komin til Kabul, hitti hann amerikanska herovastan Stanley McChrystal, amerikanska sendiharran, Karl Eikenberr, og síðani fór hann á fund við afghanska forsetan, Hamid Karzai. Politiskir eygleiðarar siga, at Obama vil hava Karzai at steðga teirri umfatandi korrupsjónini, og at hann skuldi tosa við afghanskar ráðharrar um tað í dag.

# Ólavsøkukonsertin verður partur av heildartiltaki

Seinastu tvey árini hevur Tórshavnar kommuna arbeitt miðvíst við at broyta sjálvt heildarkonseptið viðvíkjandi ólavsøkuni. Í ár verður ólavsøkukonsertin partur av hesum konsepti og ikki fyriskipað av øðrum. Orsøkin er í høvuðsheitinum, at kommunan gjøgnum fleiri ár hevur roynt at broyta ólavsøkuna, at samskipa hana betri, at nútímansgera og gera samlaða tiltakið meira fólksligt. Ólavsøkukonsertin verður sostatt samskipað við alt annað, sum kommunan skipar fyri. Sjálvt konseptið verður víðkað, høvuðskonsertin verður hildin niðri í Tórsgøtu tann 27. juli, men bólkarnir koma eisini at spæla á Tórspalli og á pallinum á Skálatrøð. Tónleikatiltak verður eisini í Perluni. Atgongumerki verða bara seld til tiltakið í Tórsgøtu, hini tiltøkini eru ókeypis.

# Kommunan skipar sjálv ólavsøkukonsertina

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð skipar kommunan sjálv fyri ólavsøkukonsertini tann 27. juli. Vælumtókta danski tónleikabólkurin Dúné verður útlendska høvuðsnavnið**

**ÓLAVSØKA**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Eitt stórt útlendskt navn skal lokka føroyingar oman í Tórsgøtu til ólavsøkukonsertina í ár. Rockbólkurin, sum spældi til X-Factorfinaluna í Parkini leygarkvøldið, Dúné, hevur játtað at koma til Føroyar á ólavsøku.

Sambært Tórshavnar Kommunu, verður ólavsøkukonsertin í ár partur av einum heildartilboði, sum kommunan sjálv skipar fyri. Sagt verður, at orsøkin er, at kommunan gjøgnum fleiri ár hevur roynt at broyta og samskipa ólavsøkuna betri, so hon verður ein meira samlað eind.

Sambært kommununi verður sjálvt konseptið víðkað, so høvuðskonsertin verður niðri í Tórsgøtu tann 27. juli, men bólkarnir koma eisini at spæla á Tórspalli og á pallinum á Skálatrøð. Harumframt verður tónleikatiltak í Perluni.

Meðan fólk skulu rinda fyri at sleppa á konsertina í Tórsgøtu, verða øll hini tónleikatilboðini ókeypis.

## Dúné til Føroyar

Danski tónleikabólkurin Dúné verður útlendska høvuðsnavnið á ólavsøkukonsertini. Fyrra árið vann bólkurin allar størstu tónleikaheiðurslønirnar í Danmark, P3 gull og ársins navn, ársins bólkur og ársins album á Danish Music Awards.

Higartil er kunngjørt, at føroysku høvuðsnøvnini verða Páll Finnur Páll, Jens Marni Hansen, Crawling Blue og Bet You Are William. Og hesaferð verður Underbeat í Perluni.



*Dúné, verður útlendska høvuðsnavnið á ólavsøkukonsertini. Bólkurin hevur fingið allar tær størstu tónleikaheiðurslønirnar í Danmark, P3 gull og ársins navn, ársins bólkur og ársins album á Danish Music Awards fyrra árið.*

# Fyrireika ólavsøkuna í góðari tíð



**Eins og í fjør verður ólavsøkan í ár miðsavnað um økið frá Vaglinum og út á Skálatrøð**

**ÓLAVSØKA**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tey flestu munnu vera samd um, at tað hepnaðist bara heilt væl at flyta tivoli úr Kommunuskúlagarðinum út á Skálatrøð á ólavsøku í fjør.

Tí hevur Tórshavnar Kommuna eisini valt at endurtaka succéina í ár.

Sambært Heðin Mortensen, borgarstjóra, verður tjóðarhátíðin miðsavnað av Vaglinum oman í Vagsbotn, Tórsgøtu og út í Skálatrøð.

Harvið ikki sagt, at hini ólavsøkuøkini verða manntóm, tí sum kunnugt eru tiltøk eisini uppi við KFUM, í Sjónleikarhúsinum, í Sankta Frans Skúla og heilt oman á Kongabrúnna.

Ætlanin er, at skipa fyri ókeypis undirhaldi við tónleiki á pallinum á Vaglinum. Eisini verða pallar settir upp aðrastaðni, eitt nú í Vágsbotni, í Tórsgøtu og í Perluni.

Úti á Skálatrøð verða tilboð til børn, sum Tórshavnar Ítróttarráð skipar fyri. Eisini og í fjør verða eisini ókeypis tilboð til børnini.

Uppi við tinghúsið verða eisini tiltøk, bæði í garðinum og framvið Tinghúsvegnum í Degns Húsi og hjá Heinesen.

Enn ber til hjá fólki, sum hava hugskot ella viðmerkingar, at venda sær til kommununa fyri at gera sína ávirkan galdandi.